# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Birgar Johannessen við nýggju havnarbókini. Á hesi opnuni síggjast stóru broytingarnar á Kongabrúnni frá 1933 til 1965. Gomlu neystini hjá havnarmonnum mugu lúta fyri størri bygningum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggja Havnarbókin í Sjónleikarhúsinum

**Birgar Johannessen er komin á marknaðin við nýggju havnarbókini "Havnin – fólk og yrki 1940-1969". Eins og fyrra bókin verður hendan eisini signerað og seld í Sjónleikarhúsinum**

Hósdagin 10. juli frá kl. 13-20 verður móttøka í Sjónleikarhúsinum í Havn í sambandi við útgávuna av nýggju bókini hjá Birgari Johannessen "Havnin – fólk og yrki 1940-1969". Talan er um annað bind og framhald av bókini "Havnin – fólk og yrki 1900-1939", sum kom út í fjør og gjørdist bestseljari.

Samstundis sum móttøkan er í Sjónleikarhúsin verður bókin at fáa í H.N. Jacobsens Bókahandli og í Rit & Rák í SMS. Bókin verður eisini at fáa í øðrum bókahandlum kring landið.

Birgar roknar við at nýggja bókin rakar ein enn størri lesaraskara enn tann fyrra við tað at bæði tey eldru og tey tilkomnu minnast hetta tíðarskeiði. Ikki minst tey tiltiknu 60-ini sum var ein tann størsta broytingartíðin í 20. øld. Nýggja bókin er prentað í 6.000 eintøkum, og yvir 1.000 myndir eru í bókini.

Í báðum bókunum eru fleiri enn 8.000 fólk nevnd. Aftast í nýggju bókini er listi í bókstavarað við øllum nøvnunum, og víst er til síðutal, har tey eru umrødd.

mg

## Andlát og jarðarferðir

**Viktor Albinus** í Øravíkarlíð andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi sunnudagin, 59 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni. Tey, ið vilja minnast Viktor, kunnu lata Suðuroyar ellis- og røktarheimi eina pengagávu, konto í pengastovnunum.

**Hans Kristoffer Mortensen**, av Argjum, andaðist sunnudagin 85 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu okkum samkenslu, tá kæri bróðir okkara

**Herfinnur Durhuus**
Vestmanna

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Sverra Steinhólm og Ingu Poulsen Dam, prest, fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, berarar, organist og kirkjutænarar.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Stóra tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Torbjørn og Jórun**

## Tøkk

Øllum tykkum, ið gleddu meg á 90 ára føðingardegi mínum, takki eg so hjartaliga.
Tøkk til børn við familjum, ið komu frá nær og fjar, og gjørdu mær dagin signaðan og ógloymandi.
Tøkk til streingjakórið hjá Frelsunarherinum, ið gleddi meg við tykkara vakra sangi.
Tøkk fyri gávur, fjarrit og uppringingar.
Gud signi tykkum øll.

**Blíðar heilsanir**
**Fredrik Joensen, Vágur**

## Dagurin

**10. juli. Knútur kongur**, deyður ár 1086. Hann varð myrdur fyri altarinum í St. Albans kirkju í Odense handa dag, og pávin skírdi hann halgimenni í árinum 1100. Fekk navnið Knútur hin Heilagi.